# Nýggjur studentaskúli í Marknagili er besta loysnin!

RÓLAND Í SKORINI
studentaskúlalærari



(2.partur)

**Til ber at varðveita heild og mentan studentaskúlans í einum depli í Marknagili eins væl og í Hoydølum, tí depilin hevur tríggjar sjálvstøðugar eindir. Hetta er eisini avgjørt neyðugt**

Tað er sera umráðandi at varðveita studentaskúlaskipanina uttan ov stórar broytingar, sum hon er, tí vit vita av áralongum royndum, at hon riggar. Hon hevur kortini ikki verið nóg góð fyri øll, tí hon hevur eisini sínar avmarkingar. Tí vóru vit noydd at útbyggja skipanina við HF í 1974. Nøkur vóru ímóti, tey hildu ikki, at tað var neyðugt, tað fór at lækka støðið, ørkymla næmingarnar við ov mongum og fjølbroyttum tilboðum osfr. Hesi hugsaðu als ikki um fjølbroytni næminganna. HF var ein hin besta pedagogiska og samfelagsliga íløgan í øllum tí danska ríkinum, eisini í Føroyum. HF fekk ein hóp av næmingum í útbúgving, sum annars ikki høvdu trivist á studentaskúla. Teir høvdu verið snýttir av samfelagnum, tí tilboðini, sum samfelagið hevði at bjóða, vóru alt ov fá til fjølbroytni næminganna. HF-næmingarnir hava verið við til at lyfta og fylla tær stuttu og miðalstuttu framhaldandi útbúgvingarnar. Tað hevði samfelagið dyggiliga brúk fyri. Sjálvandi varðveittu vit studentsútbúgvingina. Studentaskúlaskipanin livir sera væl saman við HF, hóast tað er ein heilt onnur skipan. Ja, vit hava enntá í fleiri fakum frálíkt og inspirerandi samstarv. Hvat um vit søgdu, at vit onki vildu hava við HF at gera, tí tað var á lægri og øðrvísi støði. Vit undirvísa ofta studentum og HF-næmingum í sama flokki, tá tørvur er á tí. Studentaskúlin er so sterkur, at ongin fær meg at trúgva, at nakar annar skúli kann lækka støðið á honum. Tíðin varð búgvin til HF í 1974. Nú er tíðin búgvin til, at Føroya Studentaskúli torir at lata hurðarnar upp fyri umheiminum, altjóðagerðini og samstarvinum við aðrar skúlar. Í dag er næmingahópurin nógv fjølbroyttari og krevur nógv fleiri ymisk tilboð av fakum, enn vit geva okkum far um. Í lestrarvegleiðingini leggja vit dent á at eggja næmingunum at velja grein og fak eftir áhuga, men hvussu kunnu teir gera tað, tá tilboðini eru alt ov fá og avmarkað, og so serstakliga tá møguligu tilboðini ikki verða boðin, tí ov fáir næmingar eru at velja tey. Hetta er galdandi fyri allar miðnámsskúlar, tí teir liggja spjaddir. Um Føroyar skulu menna seg og fóta sær sum tjóð til fjølbroytni og støðugar broytingar í altjóða samstarvi, mugu vit fyrst læra at samstarva innanhýsis í okkara egna landi. Tað kunnu vit læra í einum skúladepli heldur enn í isolatión í Hoydølum. Tað ber eisini til at planta trø í Marknagili, har eru eisini áir og gøtur og nógv víðari øki. Hvør kann vera so afturhaldssinnaður at forða fyri bara at geva samstarvi millum teir tríggjar skúlarnar ein møguleika? Verða møguleikarnir nú stongdir fyri samstarvi, verður mistakið ivaleyst ikki rættað í hesi øldini.

**Neyðugt er at samstarva fyri at skapa og menna fleiri fak, sum annars ongantíð verða boðin næmingunum. Eisini mugu vit forða fyri, at fleiri fak hvørva orsakað av tvørrandi samstarvi.**

Jú fleiri næmingarnir eru sum td. í einum depli, jú fleiri fak kunnu bjargast og mennast. Lat meg taka nøkur dømi um, hvussu lívsneyðugt tað er at samstarva í lítlu Føroyum, um vit skulu menna okkum. Russiskt er longu avlívað, tí vit hava ov fáar næmingar í Hoydølum, men vit hava lærarar. Fleiri á Handilsskúlanum kundu valt russiskt saman við okkum og bjargað fakinum. Eitt árið høvdu næmingar valt russiskt í 1. og 2. s við tí í hyggju eisini at velja fakið á hástigi í 3. s, sum eftir kunngerðini er ein møguleiki. Men gakk! Nú vóru brádliga ov fáir næmingar, og tí vóru nakrir teirra noyddir at velja enskt og týskt í staðin, hóast teir upprunaliga høvdu í hyggju at velja russiskt. At læra russiskt mál er alneyðugt, um vinnuliga samstarvið við Russland skal mennast; Nólsoyarfjørður er ofta fullur av russiskum skipum, men ongin lærir russiskt í Føroyum, tí vit ikki samstarva millum skúlarnar. Sama er galdandi fyri mítt fak franskt. Miðstigið er nógv minkað, og hástigið hevur tvær ferðir verið um at dottið niðurfyri, tí ov fáir næmingar vóru at velja tað. Í samstarvi við Handilsskúlan kundu vit bjargað fleiri fakum. Eg vildi fegin givið fleiri næmingum frá Handilsskúlanum møguleika at valt franskt, men tað er ómøguligt, tí vit liggja spjaddir. Í løtuni havi eg ein 1. s við bert 12 næmingum í fronskum, og eitt hástigshold við bert 5 næmingum. Hetta holdið mundi verið av ongum í summar, fyrstu ferð í 30 ár. Lógu vit í einum depli, høvdu nógv størri møguleikar verið bæði at bjargað og at boðið fleiri næmingum fleiri fak.

**Sama er galdandi fyri fleiri onnur fak, sum annaðhvørt eru við at doyggja út ella ikki verða boðin næmingunum, tí ov fá velja fakini, ella tí ov dýrt er at seta lærarar til ov smáar flokkar. Nøkur av hesum góðu og væl egnaðu fakum verða bert boðin hendinga ferð. Og tað ringasta er, at tá næmingar ynskja sær hesi fak ella enntá velja tey, fáa teir alt ov ofta at vita, at tað ikki ber til. Orsøkin er aftur, at vit liggja spjadd.**

**Lat meg nevna nøkur av teimum fakum, sum í løtuni líða undir hesi somu deyðiligu vanlagnu:**

**fransk B, russiskt B, latín A, grikst A, týskt A, evning B, filmur og sjónvarp C, fiskivinna C, fornaldarfrøði C, geografi B, latín B og C, leiklist C, oljufrøði C, stjørnufrøði C, teldufrøði C, tøkni C, vinnulívsbúskapur C.**

Sum sæst, er hetta ein hópur av fakum, sum als ikki verða brúkt í nóg stóran mun. Nøkur av hesum fakum kundu vit boðið næmingunum í nógv størri mun, um vit lógu saman í einum depli. Í veruleikanum er henda støða tragisk fyri næmingarnar. Eg havi sæð bæði keddar og grátandi næmingar, sum ikki hava fingið møguleika at velja tey fak, teir ynsktu sær. Somuleiðis høvdu Handilsskúlin og Tekniski Skúli havt eina rúgvu av fakum at boðið okkara næmingum. Serliga teimum næmingunum, sum hvønn dag uppliva, at hvør skúli sær als ikki hevur tað útboð av fakum, teir ynskja sær og hava evnir til. Samstarv hevði eisini givið nógvum nýggjum fakum ein reellan møguleika. Í dag eru tilboðini minkandi og doyggjandi. Fleiri næmingar høvdu farið at blóma, um teir fingu eitt øðrvísi samansett tilboð. Hetta verður aldri møguligt, um vit grava okkum niður í Hoydølum.

**Annars hava vit á Føroya Studentaskúla nakrar flokkar við alt ov fáum næmingum umframt aðrar størri flokkar, sum væl kundu rúmað nøkrum fáum næmingum afturat. Á HH á Handilsskúlanum manglar teimum hesi tilboð til nakrar næmingar, sum høvdu ynskt at fingið okkurt av hesum fakum við atliti at tí útbúgving, teir ætla at velja í framtíðini. Nøkur dømi: støddfrøði, franskt, russiskt, spanskt, týskt, evning, films- og sjónvarpskunning, fiskivinna, geografi, heimspeki, ítróttur, leiklist, lívfrøði, oljufrøði, stjørnufrøði og tøkni.**

Fer Tekniski Skúli í Havn at bjóða HT, eru brádliga uppaftur fleiri fak, sum skúlarnir kunnu samstarva um.

Øvugt kunnu vit siga, at nakrir av studentaskúlanæmingunum fegnir høvdu valt nøkur av teimum fakum, Handilsskúlin og Tekniski Skúli høvdu at bjóða. Her eru nøkur dømi:

**altjóða búskapur, sølubúskapur, vinnulívsrættur, virkisbúskapur, ársroknskapur, fyriskipan, marknaðarførsla og multimediadesign.**

Á Handilsskúlanum er støðan tann sama sum í Hoydølum. Næmingarnir fáa ikki møguleika at velja øll tey fak, teir annars kundu, um skúlarnir samstarvaðu. Eitt árið valdu tveir á HH at taka støddfrøði A í Hoydølum, tí ov fáir næmingar vóru, men tá var neyðugt hjá teimum at eiga bil! Skemaleggingin er eisini ein stórur trupulleiki, um skúlarnir ikki liggja tætt saman.Eitt árið fingu næmingarnir ikki týskt, tí ov fáir valdu tað. Teir kundu fingið týskt í Hoydølum.

Bæði Handilsskúlin og Studentaskúlin eru heldur lítlir í nógvum førum at bjóða tvey hold, og í summum førum megna teir ikki at bjóða eitt hold. Hetta er syrgiligt. Nakrir HH-arar td., sum ynskja at fara undir hægri lestur í teldufrøði , kundu hugsa sær at valt fysikk, men tað fáa teir bara á studentaskúlanum.

Vit líða eisini í ávísan mun undir ov smáum valholdum, tí pedagogiski innanhýsis dynamikkurin verður ov lítil. Mínar



# … Eru vit komin á eggina?

Vøksturin í 2008 er bara ein av mongu spurningum, sum tað er ótrúliga týdningarmikið at vit finna svarið til – eitt svar, sum tey fægstu kenna, men tey flestu hava eina meining um.

Tað hevði verið lættari, um vit gjørdu íløgur í eina kanning av viðurskiftinum við at víðka dátugrundarlagið og greiningarreiðskapin, soleiðis at vit við nógv størri trygd kundu sæð og tikið hædd fyri, hvønn veg tað gongur, og hvørjar avleiðingar politisk átøk fáa. Hetta hevði skapt eitt meira proaktivt, politiskt umhvørvi.

Føroyski búskapurin í dag er merktur av einum metlágum arbeiðsloysi, einum risaundirskoti á handilsjavnanum, høgum íbúðarprísum, høgum inntøkum frá mvg, sum fíggjar ein stóran part av fíggjarlógini, manglandi arbeiðsmegi, vaksandi rentum, men koyra vit við fullari ferð út av eggini?

Her er týdningarmikið at hava í huga, at vit júst hava havt eitt generelt skifti í samfelagnum, sum hevur leysgivið nógvar miðlar upp á styttri sikt. Skiftið frá 20 ára bústaðarfígging til eina bústaðarfígging við møguleika fyri avdráttarfrælsi. Hetta skiftið hevur givið tí einstøku familjuni størri nýtslumøguleikar.

Nakrir av hesum nýtslumøguleikum eru brúktir til nýtlsu og aðrir at trýsta prísin upp. Onkrir eru nýttir til íbúðarábøtur, og aðrir eru til dømis farnir til íløgur. Føroyski búskapurin skal finna fótafesti við nýggjum treytum, har lønir, prísir, arbeiðsloysi, nýtsla og lántøka skulu falla upp á pláss og til ró á einum nýggjum støði. Tað, sum vit síggja í løtuni, er (mín teoretiski pástandur) eisini ein partur av einari tillagan, har búskapurin er við at finna eina nýggja javnvág.

Upp á styttri sikt førir tillaðingin til størri eftirspurning, økta privatnýtslu, øktar íbúðarprísir, størri skatta- og avgjøldsinntøkur og manglandi arbeiðsmegi? Upp á longri sikt stegðar vøksturin í húsaprísum og nýtsluni. Fólk hava fingið nýggjan flatskerm og bil nummar tvey, men ynskja ikki bil nummar trý.

Eftirspurningurin eftir íbúðum í Havn fer eisini at verða mettaður, sum síðani fer at minka um virksemið í byggivinnuni við teimum avleiðingum fyri aðrar vinnur, sum levera til byggivinnuna, ið minkar ferðina á búskapinum og harvið kølir hann niður.

Men hvat nú um BP finnur stórar mongdir av olju á føroyska landgrunninum? So kemur ikki friður á búskapin, og so fara vit veruliga at síggja, hvussu nógv búskapurin er førur fyri at vaksa!

Standa vit á skriðubakkanum? – Tað vita vit ikki, men tað kostar einki at gita.